# Púra opið

**Lutakastið til hálvfinalurnar hjá kvinnunum í Coca-Cola kappingini lagaði seg so, at finalistarnir frá í fjør, Stjørnan og VB hittast í aðrari, meðan Søljan og Neistin hittast í hinari**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Talan verður óivað um ein tættan og spennandi dyst, tá ið tey bæði fremstu kvinnuliðini í Føroyum, VB og Stjørnan, í annaðkvøld fara at dystast í høllini í Vági.*

Fleiri vilja verða við, at steypakappingin hjá kvinnum finnur sín vinnara longu í hálvfinaluni, eftir at tað gjørdist greitt, at favorittarnir báðir, Stjørnan og VB, hittast her. Men hinvegin verður mangan tikið til, at tað er júst í steypakappingunum, at rúmd er fyri onkrum óvæntaðum úrsliti.

### Jøvn lið

Í kvøld verður fyrra hálvfinalan millum Søljuna og Neistan leikt á Giljanesi. Hesi bæði liðini tykjast rættuliga jøvn, og í landskappingini stríðast júst hesi bæði lið um bronsuplássið. Um vit skulu meta um liðini bæði í mun til hvønnannan, so kann sigast, at Neistin kanska hevur eitt lítið sindur størri breidd í hópinum, meðan Søljan í Nicoletu Radu Hansen kanska hevur størsta einstaka profilin í Sunset-kappingini.

Ein annar týðandi leikari hjá vágakvinnum er Lina Andriylyte, sum áður hevur leikt við Neistanum, og tí kennir mótstøðuliðið sera væl.

### Vágskvinnur vilja hevna ósigurin

Fyrra hálvfinalan millum VB og Stjørnuna verður ikki leikt fyrr enn í annaðkvøld í Vági. Her er talan um ein dyst millum tey bæði mest vinnandi feløgini í føroyskum kvinnuhondbólti seinnu árini, júst hesi bæði lið hittust eisini í steypafinaluni í fjør. Tá endaði Stjørnan omaná eftir ein sera spennandi og javnan dyst, har teir mongu trúfastu áskoðararnir hjá feløgunum báðum sótu sum á nálum.

Higartil í hesum kappingárinum er tað Stjørnan, ið hevur verið omaná, og greipuvinnararnir frá í fjør tykjast sera sterkir í ár, men hinvegin so eru vágskvinnur óivað sera uppsettar upp á at hevna ósigurin frá steypafinaluni í fjør.

Dystin á Giljanesi millum Søljuna og Neistan skulu brøðurnir Hannis og Uni Wardum døma, meðan dystin í Vági taka teir báðir Brandur Johansen og Heri Petersen sær av.

# Klassikari í Havn

**Fyrru hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini hjá monnum verða leiktar í kvøld, og á Hálsi verður klassikarin millum Kyndil og VÍF á skránni. Í Hoyvík hittast H71 og StÍF**

COCA-COLA KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Hvørki Daniel Rapa hjá VÍF, v.m ella Janus Einar Sørensen hjá Kyndli h.m. verða við, tá ið Kyndil og VÍF bresta saman á Hálsi í kvøld í fyrru hálvfinaluni í Coca Cola kappingini.*

Lagt er upp til tveir spennandi dystir, tá ið fyrru hálvfinalurnar í Coca-Cola kappingini hjá monnum verða á skránni í kvøld. Báðir dystirnir verða í høvuðssstaðnum, annar á Hálsi og hin í Hoyvíkshøllini.

### Skerdir kyndlamenn

Í ítróttarhøllini á Hálsi hittast arvafíggindarnir báðir, Kyndil og VÍF, í tí, sum fleiri rópa ta moralsku finaluna. Kyndil og VÍF hava verið tey bæði stinnastu liðini í landskappingini higartil í ár, og tað er neyvan ov nógv sagt, at júst hesi bæði lið hava leikliga verið eitt vet oman fyri hini liðini.

Í landskappingini hava liðini higartil í ár spælt tvær ferðir móti hvørjum øðrum, og báðu ferðirnar hava føroyameistararnir úr Kyndli verið við yvirlutan. Men tað kann gott verða, at vestmenningar eru favorittar í kvøld, tí Kyndil noyðist at verða tveir týðandi leikarar fyriuttan til dystin í kvøld. Sterki strikuspælarin hjá havnarliðnum, Janus Einar Sørensen, er leikbannaður í kvøld, eftir at hann fekk beinleiðis reytt kort í dystinum móti strandingum á Skála sunnudagin. Harumframt er landsliðsleikarin Høgni Klein heldur ikki tøkur, tí at hann meiddi sær annan fótin illa í sama dysti.

Vestmenningar hinvegin tykist fullmannaðir til dystin við undantaki av Daniel Rapa, sum framvegis ikki er førur fyri at spæla. Sjálvsálitið hjá VÍF eigur eisini at verða í lagi, eftir at teir sunnudagin við einum sigri á H71 løgdu seg einsamallar á odda í Atlantic Airways kappingini.

### Endurtøka av finaluni í fjør

Í hinari hálvfinaluni hittast H71 og StÍF í Hoyvík. Her er talan um eina endurtøku av finaluni í fjør, sum strandingar vunnu trygt. Tað er tó einki, sum bendir á, at talan í kvøld verður um ein lættan sigur til strandingar, tí hoyvíkingar hava í ár óivað eitt tað sterkasta liðið, ið teir hava havt í nógv ár.

StÍF hevði eina trupla byrjan upp á kappingarárið í ár, men tað tykist sum um, at strandingar eru við at fóta sær, og ikki minst sigurin á Kyndli sunnudagin kundi bent á tað.

H71 og StÍF hava dystast tvær ferðir áður í ár, og liðini hava vunnið hvør sín dyst. Tá ið liðini hittust á Skála, vunnu hoyvíkingar málríka dystin 38-32, meðan tað í Hoyvík eydnaðist strandingum at vinna 33-25!

Tað verða teir báðir Kristjan Johansen og Sámal Hansen, sum døma dystin í Hoyvík, meðan Kári og Dánjal Hansen døma dystinum millum Kyndil og VÍF á Hálsi.